**Langa útgávan**

Árið í fjør endaði við samstarvsfundi millum forfólkini í Etiska Ráðnum, Siðfrøðisnevnd Psykologfelagsins og Sjúkrarøktaretiska Ráðið, har avgerð var tikin um, at byrja árið við einum felags tiltakið undir heitinum "Tvey ár við koronu". Endamálið var at gera status yvir, hvørjir teir stóru etisku spurningarnir eru, sum hava víst seg í samband við koronu, hvørjar etiskar avbjóðingar liggja fyri framman, hvussu vit hava hava handfarið støðuna etiskt her hjá okkum, og hvat vit kunnu læra at tí, vit hava gjørt. Lagnunnar speisemi vildi tó, at vit máttu avlýsa...Vegna koronu!

Á fyrsta fundi í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum hin 14 januar í ár, varð avgjørt at hava serligt fokus á eldraøkið. Við støði í tilmælunum frá so sera væl frágingna álitinum hjá FFS um **"Skipan av dygdargóðum heilsutænastum í primera geiranum við høvuðsdenti á eldraøkið og sjúkrarøktarfakligar førleika",** skrivað av Jónvør Christiansen og Sunnivu á Lakjuni, valdu vit sum nakað av tí fyrsta, at spyrja Etiska Ráðið, um tey høvdu verið sinnað at skipa fyri einum tiltakið um vælferðartøkni. Tey vóru til dystin fús við tað sama og stutt eftir fóru vit undir at fyrireika tiltakið um Vælferðartøkni og etikk. Endamálið við tiltakinum var at varpa ljós á og skapa kjak um teir mongu etisku spurningarnar, sum stinga seg upp í kjalarvørrinum av stóru vælferðartøkniligu menningini. Tiltakið varð hildið í Smæruni hin 7 juni. Millum fyrilestrarhaldararnar vóru sjúkrarøktarfrøðingarnir Jóngerð Guttesen og Naina Túgvustein, sum komu serstakliga væl frá uppgávuni. Til ber at lesa meira um tiltakið her: Vælferðartøkni og etikkur - Etiska ráðið (etiskaradid.fo) og síggja stroymingina av tiltakinum her: (1110) Vælferðartøkni og etikkur - YouTube.

Tað kemur fyri, at vit fáa umbønir, um at koma at undirvísa á arbeiðisplássum. Tí avráddu vit eisini á ársins fyrsta fundi, at av tí, at bæði peningaliga- og menniskjatilfeingi er avmarkað í Ráðnum, vilja vit ansa eftir ikki at brúka ov nógva orku upp á individuellar undirvísingar. Tann orkan vit brúka upp á tey fáu, tekur frá avmarkaðu orkuni, sum vit meta verður best brúkt á ein hátt, so at flest fáa gagn av henni. Vit taka avgerð í hvørjum einstøkum føri, men tá tað kemur upp á tal, so taka vit tímatakst samsvarandi sáttmálanum hjá sjúkrarøktarfrøðingunum, umframt ferðaútreiðslur. Tað er tó gott hjá okkum at fáa umbønir, tí tað gevur okkum eina ábending um, hvat fólk fegin vilja vita meira um ella í aðrar mátar vilja hava sparring ella stuðul til. Tá tað ber til, vilja vit so royna at skipa fyri einum tiltaki fyri allar limir felagsins.

Sjúkrarøktaretiska Ráðið fær 30.000 kr árliga, og tað er onki at taka seg aftur í, at tann peningurin røkkur ikki til virksemi hjá Ráðnum. Vit søkja tí støðugt um pening frá fyritøkum, grunnum, virkjum o.s.fr. umframt frá grunnum í FFS. Tað hevur eydnast okkum at gjalda hvør sínum sítt og annars at samstarva við onnur, so kostnaðurin verður lættari at bera. Men av tí at SER ikki hevur havt egna konto, er trupult at planleggja fram í tíð, tí peningur, sum vit evt fáa, fellur til felagið við ársenda. Tað meta vit er óetiskt, tí peningur in má sjálvandi fara til tað, sum hann verður søktur til. Av tí sama hava vit tí verið varin við at søkja pening seinnu helvtina av árinum. Vegna hesa skipani, hevur Ráðið tí heldur ikki kunna spart upp til eitt størri tiltak yvirum ár. Tí hava vit arbeitt við at fáa egna konto og nakað av februarfundinum fór við hesum máli. Í FFS vóru tey jalig um hugskotið, men viðgerðin í einum fakfelag sum FFS, og ikki minst hjá einum banka, sum skal tryggja seg móti hvíttvasking, er tíðarkrevjandi. Í november vóru tó allar súður syftar og SER hevur loksins fingið egna konto og harvið størri fíggjarligt ræðisrúm.

Fundirnir eru okkara formellu fora, men millum fundirnar, eru nógvur aktivitetur á privata facebookbólkinum hjá nevndini, har vit luta hugskot og avgera, hvør fer víðari við hvørjum hugskoti og spyr seg fyri her og har. Og soleiðis var eisini millum januar og februar, har onkur fekk hugskotið um, at gera poddar. Tí var Armgarð Arge boðin við til februar fundin og tosaði við okkum um, hvussu vit kundu leggja arbeiði til rǽttis við poddunum. Vit samdust um, at poddarnir skuldu geva sjúkrarøktarfrøðingum orðið, sum starvast í tí partinum av sjúkrarøktaryrkinum, sum varðar av eldri. T.v.s. eitt sindur breiðari enn tað, vit vanliga nevna eldraøkið. T.d. eru nógv av teimum sum koma á sjúkrahús, eldri og gomul fólk.

Vit vistu longu tá, at norðurlendski fundurin, sum í ár varð hildin í Grønlandi, fór at kosta ca 20.000 kr, hóast bara ein limur fór avstað. Vit høvdu sostatt 10.000 kr eftir av samlaðu játtanini til Ráðið og satsaðu høgt, tá vit beinanvegin gjørdu avtalu um at gera tveir poddar, sum hvør kostaði 5000,- kr. Tí fóru vit beinanvegin í holtur við at søkja um pening. Rættiliga skjótt eydnaðist at fáa 10.000 kr frá Lions Club Tórshavn. Nakað seinni fingu vit 10.000 kr frá studningsgrunni í FFS, og víðkaðu avtaluna til 4 poddar. Hesir liggja tøkir bæði á heimasíðu felagsins (sjukrarokt.fo), á afturlatna facebookbólkinum fyri limir, við heitinum ”Sjúkrarøktaretiska Ráðið”, á síðuni hjá KVF og á Spotify undir poddvarpsrøðini “Etos”. Tær sum játtaðu at luttaka, vóru Herborg Petursdóttir, visitator í Tórshavnar kommunu, Poula Reinert Petersen, leiðari í Nánd, Mana Maria úr Fugloy, deildarleiðari, heimið við Vágna í Klaksvík og Andrea Gilstón Danielsen, sjúkrarøktarfrøðingur á Suðuroyar Sjúkrahúsið. Vit takka teimum so miriliga fyri, at tær vildu luttaka og eru ikki sørt stoltar av teimum og av poddunum. Vit vilja eisini takka Armgarð Arge fyri holla hjálp og sera gott samstarv.

Februarfundurin var seinasti fundurin hjá Hildur við Høgadalsá og Katrin Andersen, sum hava tænt ráðnum í meiri enn 15 ár. Á aðalfudinum, sum var í marts mánaða, var Katrine Klein Arnbjerg vald inn sum nevndarlimur. Av tí at onki forðaði fyri tí í viðtøknum og vit hava gagn av størri orku í Ráðnum, var avgjørt at tey bæði valevnini, sum ikki vóru vald inn sum nevndarlimir, skuldu verða tiltakslimir. Tí fingu vit bæði Evu Mortensen Holm og Ingun Gaardbo í Ráðið.

Nevndin skipaði seg á marsfundinum við Janu Mortensen sum forkvinnu, Birnu Mohr Joensen sum næstforkvinnu, Lilian Dam sum skrivara, Marjun Thomsen sum kassameistara og Katrine Klein Arnbjerg sum nevndarlim. Tiltakslimirnir eru tó við til allar fundir og luttaka í arbeiðnum á jøvnum føti við restina av Ráðnum. Einasti munur er, at tær ikki hava atkvøðurætt, sum vit tó sjáldan brúka, tí vit aloftast tosa okkum fram til eina semju.

Tað, at vit hava ymiskar pallar at samskifta á, hevur við sær, at viðhvørt kemur okkurt skeivt fyri. Soleiðis var ein dagin, eg í skundi skuldi leggja eini boð inn á nevndarbólkin, og kom at leggja boðini á limabólkin í staðin. Meg minnist ikki neyvt hvat stóð í boðunum, tí so skjótt eg uppdagaði tað, strikaði eg postin. Men óiva hevur manglandi peningaorka verið eitt evni, tí tá eg kom aftur til telduna, lógu longu eini boð frá Súsonnu Olsen í Klaksvík á boðklivanum, har hon boðaði frá, at hon fegin vildi lata 3000,- kr. Eg gjørdist ógvuliga illa við sum verða man, og segði sum var, at boðini á limabólkinum vóru ikki ætlað øðrum at síggja, og at vit tí ikki kundu taka ímóti so stórfingnari gávu. Men hon helt upp á sítt og eigur hon tí sín part av æruni fyri avrikslistanum hjá SER hetta árið.

Á marsfundinum var arbeitt við hugskotinum, sum onkur limur hevði luftað á nevndarbólkinum um, at gera eina stuttsøgukapping. Hugskotið spratt úr tí sannroynd, at mál sjáldan koma í Ráðið og at tað tí kann verða ilt at finna fram til, um tað eru onkrar støður ella møguliga

tvístøður, sum serliga gera seg galdandi millum føroyskar sjúkrarøktarfrøðingar. Tí var á fundinum avrátt at fáa Marjun Syderbø Kjelnæs við á aprílfundin, fyri at hjálpa okkum ávegis. Spurd, var Marjun beinanvegin til dystin fús og á aprílfundinum var harumframt avrátt, at skipa fyri eini skriviverkstovu. Avgjørt varð at seta dómsnevndina saman við fólki, sum hava innlit í bæði rithøvundayrki, sjúkrarøktarfakið og etikk. Tí varð dómsnevndin sett saman av Marjun Syderbø Kjelnes, rithøvundur og sjúkrarøktarfrøðingur, Arnbjørn Dalsgarð, rithøvundur, Cand. Mag í heimsspeki í verki og aðalskrivari í Etiska Ráðnum, og Sonju Nielsen, Námslektari og sjúkrarøktarfrøðingur við drúgvum royndum innan yrki og við góðum hegni at skriva.

Síðan var farið til verka at søkja um pening til verkætlanina. Tað gekk heldur striltið og so mikið striltið, at verkætlanin var avblást á fyrra maifundinum. Men avgerðin var ikki meira enn tikin, so komu játtandi svar frá Lív, SMS, Effo, Articon, umframt peningur frá Súsonnu Olsen, og tí varð hildið áfram við verkætlanini sum ætlað. Eina hjartans tøkk fái tey fyri tað. Skriviverkstovan varð hildin hin 1 september og 24 hugagóðir sjúkrarøktarfrøðingar luttóku.

Tá freistin at lata stuttsøgur inn var farin hin 16 oktober á midnátt, vóru 10 søgur komnar inn og hin 7 desember hittist dómsnevndin til at taka endaligu avgerðina um, hvør skuldi fáa ávíkavíst 1., 2. og 3. virðisløn. Tað var Súsanna Funding, sum vann fyrstu virðislønina, áljóðandi 5000,- kr, fyri stuttsøguna "Stjørnan á himmalhválvinum". Grundgevingin fyri at velja hesa stuttsøguna úr rúgvuni, skrivar dómsnevndin soleiðis:

> *"Vit í dómsnevndini eru á einum máli um, at stuttsøgan á sannførandi og hugvekjandi hátt lýsir sjúkrarøktarfrøðingin bæði sum fakpersón og sum menniskja í eini sera truplari støðu. Hon signalerar ein fakligan stoltleika, eina tilvitan um at gera mun og letur dyrnar upp til hvussu tað er at arbeiða við fólki í eini sorgartilgongd. "Ábyrgdin er stór og menniskjan er lítil" sigur sjúkrarøktarfrøðingurin móti endanum á hesi søguni, sum lovar lesaranum við inn í ta empatisku kjarnu sum sermerkir yrkið. Samanumtikið ein djørv og heilskapað søga um at standa í myrkrinum og vera sterk."*

Onnur virðisløn, áljóðandi 3000,- kr, fór til Vanju Klein Olsen, fyri søguna "Novisan", meðan triðja virðislønin, áljóðandi 1500,- kr, var vunnin av Sylviu Thomsen, sum skrivaði søguna "Jólaaftansvaktin". Ráðið ynskir vinnarunum hjartaliga tillukku við vinningunum. Samstundis vilja vit takka fyri allar søgurnar, sum, óansæð um tær vóru í vinnarahópinum ella ikki, hava stóran týdning fyri arbeiðið hjá Ráðnum. Vinnarasøgurnar verða sjálvandi at lesa í Vøku, men vit arbeiða samstundis við at fáa søgurnar út til ein breiðari skara.

Fyrst í februarmánað hittust øll tey norðurlendsku Sjúkrarøktaretisku Ráðini á netbornum fundi. Evni á fundinum var ein frágreiðing frá Berit Støre Brinchmann úr norska ráðnum og Catharina Lindberg úr svenska ráðnum, um arbeiði við at endurskoða etisku leiðreglurnar hjá International Council of Nurses, sum øll norðurlendsku ráðini byggja sínar lokalu leiðreglur á. Til ber at lesa meira um fundin her:
https://www.facebook.com/groups/524279708341248/posts/1123404918428721

Hóast Ráðið sjáldan fær mál inn, so kemur tað tó fyri og higartil í ár er eitt mál komið inn, sum var viðgjørt á fyrra maifundinum. Í stuttum snúi tað seg um, hvussu starvsfólk, sum eru bundin at tagnarskyldu, skulu fyrihalda seg, tá eitt búfólk manglar við døgverðaborðið og onnur búfólk spyrja eftir viðkomandi. Til ber at lesa spurning og svar her:
https://www.facebook.com/groups/524279708341248/posts/1202258233876722

Á hesum fundinum gjørdist tó greitt, at fólk vóru farin at møðast, tí arbeiðið í Ráðnum krevur so nógva tíð, serliga tí at vit skulu brúka so nógva orku til at søkja um pening til ta arbeiði, vit halda skal til, til at røkka endamálinum við ráðnum. Avrátt var tí at spyrja um loyvi frá Nevndini í FFS til at broyta viðtøkurnar, so vit kunnu fáa fleiri limir í Ráðið og annars søkja um at hækka játtanina.

Við íblástri frá áðurnevnda álitið um “Skipan av dygdargóðum heilsutænastum...”, fingu vit tað hugskot, at viðgera evni “ageism” ella aldurisma, sum í stuttum merkir, at mismunur verður gjørdur móti eldri fólki, tí tey eru komin upp í árini. Í álitinum ber annars til at lesa nógv meira um aldurismu og eisini um aldurismu í Føroyum.

Á aprílfundinum byrjaðu vit tí so smátt at fyrireika eitt tiltak um aldurismu, sum møguliga kundi haldast saman við blaðnum “Fyndini”. Blaðstjórin á Fyndini var boðin við á seinna maifundin umvegis netið, og hon var ógvuliga jalig og full av góðum hugskotum. Millum annað greiddi hon frá kanningini um aldurismu, sum spyr.fo gjørdi fyri Fyndina og sum var við í juniútgávuna av blaðnum. Endin bleiv tó, at tiltakið kom at krevja størri, bæði fíggjar- og menniskjaorku enn vit høvdu, so tí var tað goymt burtur aftur. Allarhelst verður arbeitt víðari við hesum komandi ár í staðin. Á hesum seinna maifundinum fyrireikaðu vit eisini tiltakið um værlferðartøkni og býttu ymisku praktisku uppgávurnar, t.d. bakstur, innkeyp o.s.fr. út á ráðslimirnar.

Junifundurin var einamest brúktur til avgreiðsluspurnignar og í mestan mun var tað vantandi fíggjarorkan sum nívdi. Vit høvdu søkt ymiskar norðurlendskar grunnar og annars roynt at troytt ymiskar aðrar møguleikar, til at fáa pening til at fáa ein ráðslim afturat við til Grønlands. Oftast fæst mest burturúr, tá í minsta lagi tveir limir eru á saman á norðurlendska fundinum. Tað sá tó svart út hjá okkum....

Men vit kundu so fegnast um, at KVF hevði lagt merkið til stuttsøgukapping okkara og bjóðaði okkum at luttaka í sendingin “Nón”. Tað vóru Marjun Thomsen, Birna Mohr Joensen og Jana Mortensen sum luttóku, og á hesum junifundinum sparraðu vit eitt sindur um, hvat vit fegin vildu siga. Lítið av tí bleiv tó sagt tá alt kom til alt, tí samrøðan gekk eitt sindur av sær sjálvari og verturin spurdi spontanar spurningar. Men tað gekk vist væl allíkavæl 😊

Vit hittust aftur hin 23 august, tá m.a. fyrireiking av skriviverkstovuni var á skrá. Ymisk hugskot til tiltøk vóru uppi at venda, harav eitt teirra var at gera eitt “Live-poddvarp” við øllum 4 poddluttakarunum í senn, við Armgarð Arge sum verti. Aldursimutiltakið var aftur uppi at venda og uppskot var um at spyrja seg fyri á Tórshavnar Kommunu, um tey høvdu verið sinnað at verið saman um eitt tílíkt tiltak, sum kommunan tó skuldi bera kostnaðin av. Hesi hugskot eru ikki gloymd, men verða tikin við inn í komandi ár, sum møgulig tiltøk.

Fleiri onnur hugskot vóru eisini frammi, t.d. at hava eitt limatiltak um argumentatión við einum retorikara. Tær fyrireikingarnar fóru í gongd, men tað eydnaðist ikki at fáa ein herbúgvandi retorikara at hava eitt tiltak í heyst. Vit hava tó eina hálva avtalu við ein retorikara einaferð í seinnu helvt av 2023. Vit venda aftur við meiri kunning um tað, um tað gerst aktuelt.

Tað var eisini á augustfundinum at gleðiboðini um, at vit høvdu fingið játtan frá studningsgrunni hjá FFS til gjald fyri at senda ein ráðslim til norðurlendska fundin í Grønlandi. Stóra takk fái FFS fyri tað. Restina av fundinum var brúktur til at gjøgnumganga viðtøkurnar og gera uppskot til broytingar og annars at seta eina umsókn um hækkaða játtan saman. Tær umbønirnar vóru sendar til FFS í september og vórðu lagdar fyri nevndina í FFS í desember.

Niðurstøðan var, at tað ikki ber til at hækka játtanina í komandi ár, men møguliga til annað árið eftir. Avgerð er ikki tikin um tað støðan verður møguliga tikin upp á aðalfundi.

Tá Ingun og Birna vórðu væl afturkomnar av norðurlendskum fundi, samlaðust vit til oktober fund. Tær báðar greiddu okkum frá teimum evnum, sum vórðu viðgjørd, og hava gjørt eina frálíka og innlitsgevnadi samanskriving av øllum fyrilestrunum, sum tað ber til at lesa um í Vøku.  Til hendan fundin byrjaðu vit eisini so smátt at hugaroka um, hvussu vit skulu leggja norðurlendska fundin til rættis, tá tað er okkara túrur hin 6 og 7 september í 2023.

SER fyllir 30 ár komandi ár, og tað eiga vit at feira. Spurningurin er bara hvussu. Eitt annað evni sum stakk seg upp á fundinum var mannagongdin fyri val av ráðslimum. Uppskot var frammi um at hava eina líknandi mannagongd til ráðsvalið sum til nevndarvalið hjá FFS. Tíðin er eisini komin til, at vit mugu byrja at planleggja komandi ár. Stundir vóru ikki at viðgera allir hesir spurningar til ein vanligan fund, og vit avtalaðu tí at hava eina arbeiðsdag frá 13- 18 fríggjadagin hin 11 november. Hesin mátti tó av ymiskum orsøkum útsetast til januar

Novemberfundurin vardi tí teir vanligu tveir tímarnir, sum vit m.a. brúktu til at samla upp uppá fundin, vit høvdu havt við FFS vikuna fyri, til tess at tosa um og útdjúpa fyrispurningarnir um økta játtan og broyting í viðtøkunum, sum vit høvdu sent teimum í september. Eisini planløgdu vit tiltakið fyri handan av vinningum til stuttsøgukappingina, sum var hildið í nýggja Bridgehúsinum hin 13 desember. Hølið fingu vit fyri ein ógvuliga sámiligan prís, sum eitt slag av stuðli til okkara og tað takka vit hjartaliga fyri.

Hin 12 desember var forkvinnan á fundi við nýggja formanninum í Etiska Ráðnum, Bergur Debes Joensen og forkvinnuna í siðsemisnevndini hjá sálarfrøðingunum, Anna Debes Hentze. Fakligi skrivarin, sum plagar at verða tann vit samskifta mest við, fekk ikki verði við hesuferð. Vit umrøddu sum so ikki nakað einstakt mál, men høvdu eitt felags hugarák um, hvat vit kunnu samstarva um komandi ár og hvussu hetta kann gerast. Ongin niðurstøða varð gjørd tí viðvíkjandi, men vit avtalaðu at hittast aftur í marts mánað, tó hesaferð saman við ráðslimunum í øllum trimum ráðum.

Umframt tað sum hendir inni í sjálvum ráðnum, hevur ein av limunum umboða SER í fyrireikingarnevndini, sum skuldi fyriskipa ráðstevnu um etikk í smáplássum. Skráin var klár, fyrilestrarhaldarar bidnir og hølini bíløgd. Hóast søkt var vítt og breitt um fígging til ráðstevnuna, eydnaðist tað tó ikki at fáa fígging til tiltakið og ráðstevnan varð tí avlýst.

Tað hevur verið eitt ógvuliga hendingaríkt ár og vit Í SER vilja takka fyri allan fíggjarligan stuðul og góða undirtøku millum limirnar. Ein serlig tøkk fer til teir sjúkrarøktarfrøðingarnar, sum hava lýst sjúkrarøktina so hegnisliga frá ymiskum sjónarhornum, annaðhvørt í poddrøðini, í tiltakinum um vælferðartøkni, ella í stuttsøgunum, sum komu inn til kapping okkara. Tit eru allar samlar heiðurlig umboð fyri stolta fak okkara 😊

Vegna nevndina í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum

Jana Mortensen, Forkvinna